*– Tað er sjálvandi at fegnast um, at semja er fingin í lag og starvsfólkið er komið aftur til arbeiðis, sigur Karsten Hansen, sum leggur dent á, at deildarstjórin á innkrevjingardeildini ikki er lækkaður í tign. – Hon fer burturav at taka sær av útleggingini til hon er komin upp á pláss, og tá tað arbeiðið er liðugt, fer hon aftur í deildarstjórastarvið, sigur hann*

**savnsmynd**

# Ikki talan um nakra starvslækking

*– Eg eri fegin um at tað eydnaðist at finna eina semju, men tað tók ov langa tíð, sigur Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, nú semja varð gjørd við Starvsmannafelagið um trætuna á innkrevjingardeildini. Og hann leggur stóran dent á, at tað ikki er talan um at økisstjórin er lækkaður í tign*

Sveinur Tróndarson

Sum nevnt í blaðnum í gjár, so eydnaðist loksins at finna fram til eina semju millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið um trætuna á innkrevjingardeildini á Toll- og Skattstovuni.

Í gjár segði formaðurin í Starvsmannafelagnum, at hann fegnaðist um, at fólkið var sloppið aftur til arbeiðis aftur, og mótpartur hansara í trætuni, Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, tekur undir við honum.

– Sjálvandi eri eg fegin um, at tað er eydnast at gera semju um trætuna, men eg eri eitt sindur vónbrotin av, at tað tók, so langa tíð, sigur fíggjarmálaráðharrin.

Ósemjan byrjaði av álvara 9. november og ikki fyrr enn næstan tveir mánaðir seinni eydnaðist at leggja lok á ósemjuna - ella ein part av henni í hvussu er.

## Varðveitir starvið

Undir trætuni er komið fram, at tað vóru samstarvstrupulleikar millum deildarstjóran á innkrevjingardeildini og starvsfólkini, sum var upprunaliga orsøkin til ósemjuna.

Tí kundi ein hugsandi loysn verið, at deildarstjórin á innkrevjingardeildini varð fluttur í annað starv, men so er ikki, og tað leggur fíggjarmálaráðharrin stóran dent á.

– Vit hava verið stak væl nøgd við hennara arbeiði, og hon kemur at halda fram í tí starvinum, sigur Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri.

Tað verður kortini ikki beinanvegin, at tað verður, tí ein partur av semjuni inniber, at deildarstjórin á innkrevjingardeildini í eina tíð, burturav fer at taka sær av útleggingini av innkrevjingini til økisskrivstovurnar, og tað arbeiðið tekur so nógva tíð, at hon verður frítikin fyri dagligu leiðsluni á innkrevjingardeildini. Henni fer Regin Thomsen at taka sær av so leingi.

## Nærri brúkarunum - og bíligari

Sum sagt, so ber nú til av álvara at fara undir arbeiði at leggja út innkrevjingaruppgávurnar til økisskrivstovurnar.

Sambært fíggjarmálaráðharranum er hetta eitt gamalt ynski, tí sambært hann hevur tað stóran týdning at uppgávurnar liggja so nær brúkarunum, sum yvirhøvur gjørligt.

Samstundis er eisini møguleiki at spara pening í sambandi við útleggingina og tað hevur, sambært fíggjarmálaráðharranum, eisini sera stóran týdning.

## Eingin verður uppsagdur

Í útvarpinum segði Karsten Hansen herfyri, at hann metti, at tað kundu sparast eini fimm størv í innkrevjingini, og tað fekk í gjár øði í Gunnleiv Dalsgarð.

Hann helt tað vera ófatuligt, at fíggjarmálaráðharrin, beint eftir drúgva orrustu fór út at tosa um sparingar.

Hesum skilir Karsten Hansen púrt einki av.

– Tað sigur seg sjálvt, at tað má vera okkara fremsta uppgáva, at reka hetta landið so bíliga sum tilber, sigur hann og vísir á, at tað ber ikki til, bara at halda stand við útreiðslunum, um tað í veruleikanum ber til at spara, tí tørvurin á peningi er stórur aðrastaðni í samfelagnum.

– Men er Gunnleivur bangin fyri at fólkini vera uppsøgd, so er eingin orsøk til tess, leggur Karsten uggandi afturat. – Vit hava uttan iva pláss og brúk fyri teimum aðrastaðni í okkara systemi, so tað skal nokk fella upp á pláss, sigur hann.

Sum sagt í gjár so inniber semjan, at ein samstarvsbólkur verður settur á Toll- og Skattstovuni, og tað fegnast fíggjarmálaráðharrin um.

Hann sigur, at tey hava arbeitt við at fáa reglur um hesar bólkar upp á pláss í eina tíð, men ósemjan á innrkevjingardeildini hevur bara tað við sær, at samstarvsbólkurin verður settur beinanvegin.

– Eg haldi, at tað er í fínasta lagi, tí tað skuldi verið ein trygd fyri, at slíkar ósemjur vera loystar á staðnum beinanvegin, sigur hann.

# Rætting til grein um SvF

Sveinur Tróndarson

Í greinini í blaðnum mikudagin, um at marknaðarleiðarin í SvF, Gunnhild á Rógvu Olsen, hevur sagt seg úr starvi, varð sagt, at hon í eina tíð hevur havt ábyrgdina av fíggjarliga virkseminum.

Hetta er skeivt. Í stuttari rættleiðing upplýsir Tróndur Djurhuus, sjónvarpsstjóri, at hann, frá 1. januar 2000 hevur konstituerað marknaðarleiðaran, sum fíggjarstjóra. Vit biða Gunnhild og SvF um umbering fyri mistakið

*Gunnhild á Rógvu Olsen*

# Semjan millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið

*Mánadagin 4. januar varð semja gjørd um trætuna á innkrevjingardeildini hjá Tolli og Skatti. Semjan er soljóðandi:*

a) Starvsmannafelagið viðurkennir at hava gjørt eitt mistak:
   - Innanhýsistrupulleikar skulu viðgerast og loysast á staðnum millum leiðslu og starvsfólk.
   - Álitisfólk hevur ikki rætt til at voða til fundar í arbeiðstíðini móti boðum frá leiðsluni.

b) Burturvísingarnar av álitisfólkunum verða tiknar aftur, og álitisfólkið vil ikki aftur innkalla til fundar í arbeiðstíðini uttan loyvi frá leiðsluni.

c) Partarnir viðurkenna at møguligar ákærur og hóttanir eru burtur.

d) Sett verður ein samstarvsnevnd umboðandi starvsfólk og leiðslu.

e) Tryggjast skal samstarvsnevndini, at broytingarnar verða gjørdar við atliti til § 2 í sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Notat til punkt d.**

Samstarvsnevndin skal hava innlit í **øll** mál stovninum viðvíkjandi. Samstarvsnevndin tekur ikki avgerðir, men hevur tilmælisrætt til stovnsleiðsluna í teimum málum, har avgerðir verða tiknar, sum hava beinleiðis og óbeinleiðis tilknýti til arbeiðsumstøðurnar hjá starvsfólkunum:

Millum annað verða hesi mál viðgjørd í samstarvsnevndini:

* Ajourføringar av hondbókini í seinasta lagi innan 10. januar 1000. sí skjal A.
* Kriteriu fyri flytingar av starvsfólki.
* Útgreina uppgávubýti á økir og stýrið.
* Tryggjað at allar broytingar eru í mest møguligan mun í samráð við ynski hjá starvsfólkunum.
* Tryggjað at mismunur ikki verður gjørdur á starvsfólki.
* Tryggjað verður at øll hava somu møguleikar fyri menning í starvinum, framflutningi og í arbeiðsviðurskiftunum sum heild.
* Tryggjaður verður ein opin dialogur millum leiðslu og starvsfólk um øll viðurskifti, sum hava týdning fyri stovnin.

Annars verður víst til skriv frá Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrið, dagf. 16. desember 1999 um útleggingina av innkrevjingarøkinum.

Undirskrivað av Starvsmannafelagnum
og Fíggjarmálastýrinum

-----o-----

Í notatinum um útleggingina stendur m.a. at útgreinast skal hvørjar uppgávur skulu leggjast út á økisskrivstovurnar og hvørjar skulu vera liggjandi á høvuðsdeildini. Eisini skal ásetast hvussu nógv fólk skulu taka sær av innkrevjingini í hvørjum øki.

Starvsfólkini fáa, sambært skrivinum, møguleika at seta fram ynski hvar tey ynskja at arbeiða.

Í sambandi við arbeiði skal ansast eftir, at útleggingin verður til minst møguligan báða fyri starvsfólkini á innkrevjingardeildini, og at fakligi førleikin í mest møguligan mun verður varveittur.

Birgit Vitalis Ottosen, økisstjóri, hevur høvuðsábyrgdina av útleggingini, og ímeðan tað arbeiðið fer fram, hevur Regin Thomsen, deildarstjóri í stýrinum, dagligu leiðsluna av innheintingini. Hetta starv kemur hann at hava til útleggingin til økini er liðug tann 1. apríl 2000

Skrivið frá Toll- og Skattstovuni er undirskrivað av Óla Heinesen, stjóra.



# Almennir stjórar blíva privatir

*Nógv bendir á, at almennir stjórar rýma yvir í privata vinnulívið, tí teir sleppa ikki at nýta síni evni hjá tí almenna, heldur búskaparfrøðingur.*

Dánjal Højgaard

Almennir stjórar eru skerdir fuglar.

Politikararnir leggja seg út í teirra arbeiði, og teir fáa ikki lagt langtíðarætlanir, tí teir eru bundnir av árligum játtanum úr løgtinginum. Tað er ørkymlandi fyri stjórar við hugskotum og ætlanum, og tískil velja fleiri av teimum at royna eydnuna í privata vinnulívinum.

Hetta heldur í hvussu so er Mathea Hilduberg, búskaparfrøðingur.

Hon heldur, at tað er vert at leggja til merkis, at fleiri almennir stjórar eru endaðir í privata vinnulívinum. Og hetta er meira enn tilvild, sigur hon, og vísir á tvinnanda umstøður, sum kunnu vera orsøk til at teir almennu stjórarnir velja privata vinnulívið.

- Politikararnir leggja seg ov nógv út í arbeiði hjá stjóranum, so at hann ikki sleppur at arbeiða sjálvstøðugt. Harafturat eru avmarkingar av økonomiskum slagi. Stjórin veit ongantíð hvussu verður við framtíðini, tí peningur verður ikki játtaður á løgtingsins fíggjarlóg fyri meiri enn eitt ár í senn. Ein stjóri má hyggja longri fram, kanska eini trý ár, sigur hon.

## Renna seg føst

Mathea Hilduberg - sum sjálv er marknaðarleiðari í Føroya Sparikassa - heldur okkurt benda á, at fólk við góðari útbúgving og góðum hugskotum renna seg føst í almennu stjórastørvunum.

-Nógv byrja innan tað almenna. Tey hava góða útbúgving og førleika og nógv góð hugskot. Men sleppa tey ikki at virka so gerast tey vónsvikin. Tí fara tey yvir í privata vinnulívið, har tey betri fáa brúkt sín fakliga førleika, sigur hon.

Mathea Hilduberg heldur, at vandi er fyri, at teir almennu stovnarnir missa tað dugnaliga fólkið -kompetansuna. Til tess at forða fyri hesum mugu stjórarnir fáa frið at arbeiða fyri politikarunum. Samstundis mugu teir sleppa at leggja ætlanir, sum røkka longri í tíðina, sigur hon.

## Privatir stjórar eisini skerdir

Allan Skaalum, fyrrverandi stjóri á ALS - sum nú er stjóri í eini privatari fyritøku - er lutvíst samdur við búskaparfrøðingin.

Hann heldur, at okkurt bendir á, at almennir stjórar verða ørkymlaðir av, at tað kann verða trupult at vinna fram við broytingum, og at teir somuleiðis ikki vita hvussu nógvar pengar stovnurin hevur at virka fyri meiri enn eitt ár í senn. Í hesum sambandi hugsar hann ikki um sítt gamla arbeiðspláss, sum er í eini serligari støðu.

Allan Skaalum vísir hinvegin á, at ein privatur stjóri sleppur heldur ikki undan uppílegging, tí hann noyðist at standa til svars fyri nevndini. Munurin er bert, at stinga trupulleikar seg upp, so koma teir nógv meira fram alment, um tað er ein almennur stjóri, ið stendur fyri skotum, sigur Allan Skaalum.

*Í blaðnum í gjár var grein um títtu stjóraskiftini í 90'unum*

# Stjórarnir koma og fara

*Føroyski arbei›smarkna›urin hevur neyvan havt og mist so nógvar stjórar sum í 90-unum. Krøvini til stjórarnar eru herd og hugbur›urin til stjórastarvi› er broyttur.*

Dánjal Højgaard

Um dagarnar frættist at Annika Wardum Joensen hevur sagt upp sum stjóri á Fer›ará›num, eftir smá tr‡ ár í stjórasessinum. Herfyri seg›i Allan Skaalum stjórasessin frá sær á ALS. Hann sat í tvey ár. Og fyri ikki so langari tí› sí›ani fór Jóhan Hendrik Svabo Samuelsen eftir 11 mána›um frá sum settur stjóri á Almannastovuni.

Fer›ará›i›, ALS og Almannastovan er nøkur av teimum mongu arbei›splássum, sum hava havt skiftandi stjórar tey seinastu árini. Eisini á Fiskasøluni, Fiskavirking, Sjónvarpinum, Strandsfer›sluni og Sjúkrahússstjóraembætinum eru stjórarnir komnir og farnir.

## Ikki lívstí›arstarv

At vera stjóri - antin ta› er í eini privatari fyritøku ella á einum almennum stovni - tykist ikki longur at vera eitt lívstí›arstarv.

-Fyrr sótu stjórarnir til teir ikki klára›u at tyggja smør longur. Ta› gera teir ikki longur. Nú sita teir ikki longri, enn at ta› kann forsvarast, sigur Bergur Godtfred, lærari í lei›slu og samstarvi á Føroya Handilsskúla.

## Kaldari á tindinum

Títtu stjóraskiftini tykist at hava samband vi›, at ta› er vor›i› meira ábært at vera stjóri. Tí›irnar hava veri› umskiftiligar og krøvini til stjórarnar eru herd.

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, heldur, at partafelagslógin, sum kom í 90-unum, hevur sett størri krøv til professionella lei›slu.

-Hetta hevur sett størri krøv til nevndirnar og til stjórarnar, sigur Jan Mortensen.

Stjórin á Fiskasøluni, Hans Johannes á Brúgv, heldur, at ta› valdar ein n‡ggjur hugbur›ur í vinnulívinum. N‡ggir eigarar vi› n‡ggjum tonkum eru komnir framat. Krøv og úrslit viga kanska tyngri enn nakrantí›.

-Eg veit ikki hvussu ta› hevur veri› fyrr, men í dag ræ›ur ta› um úrtslit og úrslit, alla tí›ina, sigur Fiskasølustjórin.

## Eingin fri›a›ur

Handilsskúlalærarin, Bergur Godtfred, heldur ta› hava t‡dning, at stjórarnir í dag í størri mun mugu standa til svars fyri síni avrik.

-Teir skulu kunna vísa á úrslit. Og ta› sum ver›ur gjørt í dag, er at ábyrgd ver›ur plassera›. Ta› hava vit ikki sæ› fyrr. Fyrr vóru stjórarnir kanska fri›a›ir í flokki A.

-Mongu stjóraskiftini í Føroyum eru ikki eindømi í teimum mentanum, i› vit vanliga sammeta okkum vi›. Vit eiga at síggja tey sum eina tilla›ing til mentaninar, i› eru uttan um okkum. Har eru stjórar ikki fri›a›ir - tvørturímóti, sigur hann.

## Søkja avbjó›ingina

Ein onnur orsøk til tey títtu stjóraskiftini tykist vera, at stjórasessurin ikki longur ver›ur mettur sum eitt lívstí›arstarv.

Jan Mortensen vísir, á, at arbei›smegin sum heild er vor›in meira mobil, og at hugbur›urin til stjórasessin er broyttur.

-Her er ein broyting hend. Fólk eru ikki bangin fyri broytingum longur og stjórastarvi› er eitt stig á yrkislei›ini - eitt slag av løgarsteini, sigur stjórin í Vinnuhúsinum

## Stabilitetur í vanda

Hóast ta› kann vera gott fyri persónligu menningina hjá stjórunum sjálvum, so er ta› kortini eitt vandamál fyri arbei›splássi›, um ta› ver›ur alt ov títt millum stjórarnar, heldur Bergur Godtfred.

-Ta› kann ver›a óheppi› um fólk bert eru í stjórasessinum t.d. í eini tvey ár. Tá fært tú ikki tryggja› tann ney›uga kontinuitetin á arbei›splássinum og eina stabila virkismentan, sigur hann.

Jan Mortensen ávarar hinvegin ímóti, at stjórar ver›a sitandi ov leingi í flógva stjórasessinum.

-Ta› eigur at vera ein endurn‡gging í einum stjóra. Og mark er fyri hvussu leingi ein stjóri kann skapa endurn‡gging, sigur Jan Mortensen, sum sjálvur var stjóri á Fer›ará›num eitt skifti í 90-unum.

## Nakrir stjórar sum komu og fóru

*Allan Skaalum, fyrrverandi stjóri á ALS.*

*Annika Wardum Joensen , skjótt fyrrverandi stjóri á Fer›ará›num*

*Tommy Petersen, fyrrverandi stjóri á Almannastovuni.*

*Bjarti Mohr, fyrrverandi stjóri í Fiskavirking*

*Bjartur Dalsgar›, fyrrverandi stjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar*

*Jan Mortensen, fyrrverandi stjóri í Fer›ará›num*

*Jákup Mørkøre, fyrrverandi stjóri í Fiskavirking*

*Jóan Hendrik Svabo Samuelsen, fyrrverandi settur stjóri á Almannastovuni*

*Jógvan Mørkøre, fyrrverandi stjóri á ALS.*

*Niels Sørensen, fyrrverandi stjóri á Fiskasøluni*

*Poul Michelsen, fyrrverandi stjóri á Fiskasøluni*

*Sjur›ur Horsdal, fyrrverandi stjóri á ALS*

*Torger› Nielsen, fyrrverandi stjóri á ALS*

*Bjarti Mohr, fyrrverandi stjóri á Fiskasøluni*

*Thomas Arabo, fyrrverandi stjóri á Strandfer›sluni*

Rover - ein klassi fyri seg!

Fleiri og fleiri velja teir sera vælumtóktu Rover bilarnar!

Rover 416 SI 5 hurðar 111 HK, 0-100 km/t 10,7 sek.
Kr. 177.800,-

Rover 214 SI - 5 hurðar 103 HK, 0-100 km/t 10,3 sek. Kr. 149.800,-

Rover 420 SI 136 HK, 0-100 km/t 9 sek. Kr. 199.800,-

2.0 Turbo Diesel v/Intercooler 105 HK Kr. 214.800,-

Rover 623 SI "Automatic" 158 HK, 0 - 100 km/t 9,5 sek.
Kr. 298.800,-

Rover 620 TI 200 HK Turbo v/intercooler. 0 - 100 km/t 7 sek.
Kr. 284.800,-

Rover 620 SI 131 HK, 0-100 km/t 9,5 sek.
Kr. 236.800,-
2.0 Turbo Diesel v/Intercooler 105 HK
Kr. 251.800,-

Vælkomin til ein Rover royndartúr

Pf. D. B. Bilar
J. Broncksgøta 15 - Tlf. 310 600